# Um tíðarfesting av føroyskum fitisteinsfundum.

Eftir *Sverra Dahl.*

*Inngangur.*

Fornminnissavnið eigur nakrar gripir, amboð og búnýti úr fitisteini, sum komnir eru inn higar gjøgnum árini, og sum ikki fyrr hava verið gjøllari umfarnir hvørki einsæris ella undir einum[10].

Ætlanin við hesi grein er: 1) at lýsa hesar gripir og kanna eftir, hvussu víða um oyggjarnar og undir hvørjum umstøðum, ið teir eru funnir og 2) at vita um tað ber til at koma til eina nýtandi tíðarfesting við at meta teir saman við gripir av sama slagi í hinum Norðurlondum.

Til tíðarfestingar av gripum okkara hava vit her í Føroyum ikki enn nakað sammetingartilfar, sum fullgott hald er í; tessvegna mega vit leita til grannarnar og vita, hvussu langt vit, við varsemi og fyrivarni, kunna koma við at bera saman útsjónd og evningarhátt gripa teirra og okkara. Hetta skuldi í hesum føri verið serliga loyvt, við vón um gott úrslit, við tað at ráevnið — fitisteinur — finnst ikki í Føroyum, men má hava verið innflutt higar, annaðhvørt ótilevnað ella tilevnað.

*Fitisteinur.*

Hetta steinslag, sum í Føroyum er nevnt fitisteinur ella í vissum førum grøðisteinur, er ljósagrønt, myrkagrønt ella blátt, tætt talkskifur. Tað er feitt og seigt, lætt at telgja og saga og so bleytt, at tað er skøvandi við negl. Syngur ikki í tí, tá ið sligið verður á tað við hamari, men hamarsmerki standa eftir. Stendur ímóti øllum veðri og er eldfast.

Hetta steinslag nevndu teir á fornmálinum tálgugrjót ella tálgusteinn. Norðbúgvarnir í Grønlandi søgdu helst «telgistein», tí *Bárðarson*[1] skrivar soleiðis: thelliesteen. Í Hetlandi æt tað kleber, kleberg[9]; á norskum máli klebersten, donskum vegsten, á týskum Specksteín, enskum soapstone, og íslendskum tálgusteinn; men nýliga hevur *Kristján Eldjárn,* tjóðminjavørður, mælt til har at nýta navnið klèberg[5].

Navnið grøðisteinur hjá okkum kemur av, at menn hava nýtt fitistein at skava av niður í sár, tí hildið varð, at hann hevði grøðievni.

Vit hóma annars av evnislýsingini frammanfyri og nevndu nøvnunum, at tað má vera um steinslag at tala, sum eyðkent er av síni fiti, er bleytt og væl telgjandi og umframt má hava dugað til kókingarílát, grýtur.

Tað kann ongan undra, at menn ógviliga tíðliga í tíðini eru farnir at evna hetta sjáldsama tilfar til mangt. Í Noregi vita teir um, at steinaldarmenn nýttu fitistein, til hamarar og øxir; og Norðmenn hava nýtt hann allar tíðir síðan, tó, sum tað tykist, mest í víkingaøld og í miðøld.

Haðan hevur stórur útfluttningur verið av hesum lutum. Fyrst og fremst fitisteinsgrýtur vórðu sendar frá framleiðslustøðunum lidnar ella fram undir lidnar bæði til innanlendis og uttanlendis nýtslustøð. Teir hava í Noregi funnið fleiri stór, forn fitisteinsnám; haðan eru grýtur fluttar út til lond, sum einki eiga av hesum tilfari.

Fitisteinsgripir okkara eru helst eisini komnir úr Noregi,

men kortini eiga vit at hava í huga, at teir fullvæl eisini kunna vera komnir henda vegin úr Hetlandi, næsta grannalandið, sum vit óivað høvdu støðugt samband við. Har er nógv til av fitisteini, sum nýttur hevur verið gjøgnum øldir[3].

Eg havi í summar fregnast eftir, um tað er gjørligt at avgera, bæði um fitisteinsgripir eru evnaðir í tí og tí náminum, og um hann kann vera komin úr Noregi ella Hetlandi; tessverri man hetta vera torført ella ógjørligt, tí, sum kønir siga, hesin steinur er soleiðis skikkaður, at hann í sama námi kann vera misjavnt harður, littur og evnisliga samansettur.

Vit hava longu nevnt, at fitisteinur frá náttúrunnar hond er í Noregi og Hetlandi; lat okkum skoyta uppí, at hann finnst víða um heimin, eitt nú í Grønlandi, og mangar aðrar staðir, har fólk frá fyrndartíðum hava dugað sær at nýta hetta frálíka tilfar í ymisk búnýti og til byggingar; t. d. er tann heimsgitna dómkirkjan í Tróndheimi øll bygd úr fitisteini. Eisini í dómkirkju okkara «Múrinum», Kirkjubø, er fitisteinur nýttur sum byggitilfar; kortini eina mest sum klípur.

## *Fitisteinsfundir.*

Tey seinnu árini eru víða hvar um landið skrásettir gripir, sum fólk hava funnið og goyma; við tað at hetta mest alt eru leysafundir verða hesir ikki tiknir við her. Vit halda okkum til teirra, sum savnið eigur og gera bara 3 undantøk og telja uppí 1) teir føroysku gripir, sum eru á Nationalmuseet, København, tí at hesir eru fyrr skrásettir enn nakar okkara her á savninum, 2) teir gripir, sum harra *Tummas Reinert*, bóndi í Kaldbak, hevur savnað, tí at har eru nakrir sermerktir og 3) nakrar í Kirkjubø, tí teir hava eina serstøðu. Gripir, funnir eru við rannsóknina 1953–1955 hevur ikki borið til at fáa við, tí at hetta tilfar enn er óviðgjørt.

Teir gripir, sum savnið eigur, eru misjavnir í tilfari, til-

evningarhátti og tíð. Summir eru heldur harðir, summir bleytir og mjúkir, summir ljósari, summir døkkari, (grá)-bláir ella nakað gulligir; summir óvandaliga, summir snøgt evnaðir; summir eru skilliga gjørdir úr íláta- ella øðrum búnýtabrotum, eins og fleiri ferðir sæst, at ílát eru stiftað ella pentað; summir eru í seinni tíðum funnir og tiknir aftur til brúks, annaðhvørt umevnaðir, t. d. stoytingar-formar og grøðisteinar; ella óbroyttir, t. d. rennlar. Meginparturin er brot; helst øll ílátini, einki er enn funnið heilt, men av nøkrum er tó so mikið, at eingin ivi kann vera um upprunaligu útsjónd og gerð teirra.

### *Um tíðarfesting av føroyskum fitisteinsfundum.*

Hetta tilfar er alt gjøgnumgingið og skipað í talvu og skrá. Í talvuni er alt tikið við, men í skránni bara teir av gripunum, sum eftir fundumstøðum og skapi kunna ætlast at tæna endamálinum við hesi grein: tíðarfesting.

Hesir gripir eru settir upp eftir teirri røð, teir eru inn-skrivaðir; fyrsta talið er tað nummar, teir hava fingið á søvnunum. Síðan er í stuttum sagt frá fundarstaði og -um-støðum, navni og lýsing gripanna. Nøvnunum viðvíkjandi skal verða viðmerkt, at nýtt er ílát um øll holað búnýti; bara har vissa er fyri nýtslu og sniði er seinri, nýtt grýta ella bolli um størri og smærri kókingarílát. Somuleiðis er í øllum førum skrivað rennil, sum fyrst og fremst um-fatar handsnældurennlar, summir av hesum munna kortini, vegna støðd og tyngd heldur vera krintals-rennlar.

Umframt vanligastu styttingar eru her nýttar: Su. s.: Suðuroyar sýsla; Sa. s.: Sandoyar sýsla; Vá. s.: Vága sýsla; St. s.: Streymoyar sýsla; Ey. s.: Eysturoyar sýsla; No. s.: Norðuroya sýsla.

### *Føroya Fornminnissavn.*

Nr. 245. Sandi, Sa. s.: Úr Sands kirkju. Skírnarkar.
Fersíðað kar við øllum fýra hornum uttan skorin rund sum

súluskøft. Úr ljósagráum tilfari; útsíðurnar púra slættar, á innsíðunum far eftir meitlahøggum; botnurin flákúputur við einum tømingarholi í miðjuni. Tromin bein og sløtt við felling fyri loki.

Karið uttan, um tromina: 52,5 × 52,5 cm
Karið innan, um tromina: 48 × 48 cm
Karið uttan, um botnin: 48 × 46 cm
Tromin 2 cm tjúkk,[1]) við fellingini 4 cm, og tjúknar oman eftir.
Dýpið innan 27 cm.
Eitt búmerki skorið í eina síðuna, annars eingi prýði.

Nr. 715. Hvalba, Su. s.: Funnin í eini húsagrund. Rennil. Flatur undir niðan við hvassari røð, árundur omaná; tvm. 3,9 cm, h. 2,0 cm.

Nr. 905. Mikinesi, Vá. s. Handsnældurennil. Flatur undir niðan og íflatur omaná; tvm. 3,2 cm, høgur 0,4 cm. Endurnýttur, innkomin við snældu.

Nr. 1153. Tórshavn, St. s. Úr Hammershaimbsgarði á Høga Reyni: Skírnarkar? Stórt ferhyrnt kar við slættum útsíðum og meitlafarum innan; 77,5 cm l., 53,5 cm br., 39 cm h. Botnurin er hjallaður í tveimum stigum, so hann niðast er 61 × 48 cm; hevur tessvegna óivað staðið niður í ein fót, tað ið ikki var óvanligt í miðøld[11]. Í botnsmiðjuni runt hol; tromin sløtt við felling fyri loki, langsíðurnar 6 cm tjúkkar og smalsíðurnar 8 cm t. (við fellingini).

Nr. 1578. Leirvík, Ey. s.; Rennil; flatur undir niðan, árundur omaná; tvm. 3,6 cm; høgur 1,6 cm; endurnýttur, innkomin við snældu.

Nr. 1796. Miðvági, Vá. s.: Úr kirkjuni? Skírnarkar; 4 brot sum hoyra saman, og vísa botn av ferhyrntum kari, 54 × 35 cm, yvirparturin burtur, tømingarhol í einum horninum.

Nr. 2103. Sumba, Su. s.: Funnin í jørðini í «Árdalinum». Vaðsteinur. 2 hol á síðuni og 1 hol í endanum, foyra rundan um upp og niður; 9 cm l.

Nr. 2137. Øravík, Su. s. Funnin upp úr grundini á teimum gomlu húsunum «uppi í Stovu». Vaðsteinur, ljósagráur, breiðastur á miðjuni, smælkar út móti báðum endum, sum eru beint avkubbaðir; heilt flatur øðrumegin, høgt árundur øðrumegin, tvørskurður mest sum hálvkúla; við báðar endar borað hol ígjøgnum, frá øðrum grunn foyra niðan um endan; í hin endan er borað hol 8 cm inn í steinin (til stungu?);

---

[1]) Fyri langur, breiður, høgur, tjúkkur og tvørmát eru eisini nýttar styttingar: l., br., h., t. og tvm.

18,6 cm l., 7,8 cm br. á miðjuni, og har 5,3 cm h.; endarnir um 5 cm br. (6. mynd),

Nr. 2230. Skarvanesi, Sa. s. Funnið í jørðini. Skaftgrýtubrot? Brot av einum íláti, sum hevur verið o. u. 18 cm vítt um tromina innan, har tað er flatbotnað, dýpið 4,5 cm, meðan botnurin uttan tykist hava verið árundur. Skaftið eisini brotið; heldur flatt omaná, annars runt; 3,9 cm h., 4,9 cm



1. mynd. *Skírnarkar* nr. 245. — Soapstone font.

br., við rótina; svart av ími uttan. Er væl ov stórt at vera kola, má heldur vera skaftgrýta. (Rygh 728).

Nr. 2467—2471. Sandi, Sa. s. Funnið úr bakkanum «niðri á Sondum». Ílátabrot (2467), holað innan sum lítil flatbotnað skál, áflatt uttan og ímut; 7,8 × 4,8 cm, h. 2,8 cm. Rennil (2468) hálvur, flatur báðumegin, við rættari rond; tvm. 3,3 cm, h. 2,0 cm. Rennil (2469), flatur báðumegin, rundrandaður, úti við rondina borað hol (til tógvið?); tvm. 3,5 cm, h. 1,1 cm. Ílátabrot, (2470). Kúput brot av stórari bollakendari grýtu, tromin fløt, men útsíðan sneidd við eggjarni, ímut uttan; 17 cm l., tromt. 1,7 cm, veggjat. 2,2 cm. Ílátabrot, (2471). Kúput brot, møguliga av somu grýtu sum nr. 2470, er gatað við fleiri boraðum holum, í einum situr jarnnagli, til stiftingar ella oyra; 9 cm l., veggjat. 2,2 cm.

Nr. 2497. Skálavík, Sa. s. Funnin «í Mittingi» sbr. 3540 og 3564—69.

Rennil; rennlaevni: eygað er ikki fulltelgt; flatur undir niðan, árundur omaná; tvm. 4,3 cm, h. 2,0 cm.

Nr. 2817. Nólsoy, St. s. Funnið í kirkjugarðinum. Skírnarkar. Heilt ljósagrátt, ferhyrnt við rundaðum súluvaxnum hornum eins og nr. 245; slætt uttan, men ikki so snákað sum nr. 245, góðsið ójavnt tjúkt; uttan í erva 52,5 × 55 cm, innan í erva 47 × 50 cm; botnurin 49 × 55 cm, flákúputur innan við meitlahøggum og holi við eitt hornið; hæddin 22,5 cm; góðsið í erva 2—3 cm t.

Nr. 2825. Tórshavn, St. s. Funnið «í Restorffsgarði», (har apotekið stendur). Ílátabrot, trom av lítlum, ljósagráum bolla; 8,2 × 5,1 cm, t. 1,2 cm.

Nr. 3500. Kvívík, St. s. — «niðri á Toft», har rannsakaðir eru fornir bústaðir. Rennil, flatur undir niðan, áflatur omaná; tvm. 3,7 cm, h. 1,7 cm (d 1). Rennil, hálvur, flatur báðumegin, skorur ískornar øðrumegin; tvm. 4,1 cm, h. 1,5 cm (d 2). Rennil flatur báðumegin, ferhyrntur við flatum síðum og rundaðum hornum; br. 4,0—5,0 cm, h. 1,9 cm (d. 3). Rennil flatur undir niðan við ímskón, árundur omaná, við einum haki skornum á skák í rondina; tvm. 4,0 cm, h. 1,9 cm (d. 4). Rennil flatur undir niðan, áflatur omaná, rondin er rundað; tvm. 6,0 cm, h. 1,6 cm (d 5) (2. mynd nr. 1). Rennil, hálvur, flatur báðumegin; tvm. 4,5 cm, h. 2,2 cm (d. 6); Rennil flatur undir niðan við svartari ímskón, áflatur omaná, við einari klingru um eygað og skøvum upp og niður frá klingruni allan vegin runt um rondina; tvm. 3,8 cm, h. 1,5 cm (d 7) (2. mynd nr. 3). Rennil, íflatur undir niðan, áflatur omaná; tvm. 4,1 cm, h. 1,7 cm (d. 8). Rennil flatur undir niðan, árundur omaná; tvm. 4,5 cm, h. 2,0 cm (d. 9). Rennil, hálvur, flatur undir niðan, áflatur omaná, — frá eyganum og út gjøgnum síðuna er hol borað; tvm. 4,0 cm, h. 1,7 cm (d. 10). Rennil, ójavnt vaxin báðumegin; tvm. 4,7 cm, h. 1,4 cm (d. 11). Rennil, óslætt flatkendur undir niðan, árundur við rættum síðum sum ein kvarnarsteinur; tvm. 4,2 cm, h. 1,9 cm (d. 12). Rennil, brot, flatur báðumegin; br. 3,3 cm, h. 1,5 cm (d. 13). Rennil, flatur undir niðan, árundur omaná; tvm. 3,1 cm, h. 1,7 cm, (d. 14), (2. mynd nr. 4). Rennil, flatur báðumegin; tvm. 3,8 cm; h. 1,5 cm (d. 17). Rennil, flatur undir niðan, annars bunguvaxin og hevur eina lægd í rondini, nakað sum (d 4), men grynnri; tvm. 3,5 cm, h. 2,4 cm (d. 18) (2. mynd, nr. 5). Rennil, brot, flatt báðumegin; tvm. 4,1 cm (d. 19). Rennil, úr ljósagráari tilfari enn hinir; tvm. 5,0 cm (d. 20).




2. mynd. *Rennlar.* 1, nr. 3500 d 5; 2, nr. 3544 d 7; 3, nr. 3500 d 7; 4, nr. 3500 d 14; 5, nr. 3500 d 18; 6, nr. 3500 d 1; 7, nr. 3500 d 4; 8, nr. 3544 d 4. — *Soapstone spindle whorls.*

Rennil, flatur undir niðan við ískornum skorum, árundur omaná; tvm. 3,7 cm, h. 1,7 cm (d. 22). Rennil, flatur undir niðan, árundur omaná; tvm. 3,7 cm, h. 1,7 cm (d. 23).
Ílátabrot; av trom og síðu, sum vísa búkut bollakent ílát; l. 13,5 cm, br. 8 cm; tromin rundað, 1,4 cm t.; veggirnir 2,2 cm t. (f. 4). Ílátabrot, (4 sum hoyra saman) av bolla, sum er ljósari á liti enn øll hini, ímskón uttan; 12,5 cm l., 6,6 cm br., 1,1 cm t. (f. 5).
Ílátabrot, av einum stórum, tjúkkveggjaðum íláti; undir

tromini hol, sum hava verið til høddu, ella tí at brotið er nýtt sum klíggjasteinur í vevi? 18,5 cm l., 15 cm br., 2,7 cm t.; tromin 2,2 cm t., ímut innan og uttan. (f. 7).

Ílátabrot, stórt, av tromini á einum stórum vøkrum bolla, rundan um undir tromini, sum er slætt omaná, eru skornar tvær sammiðaðar skorur, ímut uttan; l. 1,7 cm, br. 12,5 cm, t. 1,4 cm; tromin 7 cm l., 1,2 cm t. (f. 17) (grýtan endurgjørd, 4. mynd).

Vaðsteinur, lítil, sera snøggur, breiðastur á miðjuni og smælkar móti báðum endum, sum hvør hevur eitt borað hol; 11,8 cm l., 4,2 cm br., 3,2 cm t. (s. 1) (6. mynd); smbr. 2137.

Nr. 3532. Trongisvági, Su. s. Norðanfyri «Guttansgarð» í eini veltu, har komið varð á ymist, sum vísir á búpláss.

Rennil (3532 d) vakur, lítil, flatur undir niðan, høgt árundur omaná, eins og kleimd hálvkúla; tvm. 2,4 cm, h. 1,2 cm.

Nr. 3540. Skálavík, Sa. s. — «í Mittingi» har rannsakað er fyrr órógvað búpláss (sbr. nr. 2497 og 3564—3569). Rennil (3540 a) flatur undir niðan, árundur omaná; tvm. 3,9 cm, h. 1,5 cm. Rennil (3540 b) stórur rennil, helst ikki handsnældumen krintalsrennil. Flatur undir niðan, áflatur omaná við eini ósnøggari klingru uttan um telgt eyga; tvm. 9,1 cm, h. 3,6 cm. (3. mynd, nr. 1).

Nr. 3544. Kvívík. St. s. — «niðri á Toft», har rannsakaðir eru bústaðir. Nr. 3544 hoyra saman við nr. 3500. Rennil, flatur báðumegin, sneiddur omaná og við næstan rættari rond; tvm. 3,4 cm, h. 1,9 cm (d. 1) (2. mynd nr. 6). Rennil flatur undir niðan, høgt árundur omaná; tvm. 4,0 cm, h. 2,2 cm (d. 4) (2. mynd nr. 8). Rennil, flatur undir niðan, árundur omaná; tvm. 4,2 cm, h. 1,8 cm (d. 5). Rennil, flatur undir niðan, áflatur omaná, niðara røðin hvøss; tvm. 4,5 cm, h. 1,5 cm (d. 7) (2. mynd nr. 2). Rennil, flatur báðumegin; tvm. 4,1 cm, h. 1,2 cm (d. 8). Ílátabrot (3), (lítil skál?) runt, grunt, flatbotnað, tunnveggjað ílát, størsta brotið: 6,0 cm l., 4,5 cm br., 0,7 cm t. (f. 1.). Ílátabrot (7); 4 eru sett saman, og vísa kúputan bolla. Tromin fløt og 1,7 cm t.; veggjat. 2,2 cm; undir tromini naglahol, ivaleyst festi til oyra; ímut uttan; grýtan hevur verið 28 cm víð innan um tromina og 11 cm djúp. (f. 5) (5. mynd).

Nr. 3564—3569. Skálavík, Sa. s. — «í Mittingi», har rannsakað er fyrr órógvað búpláss. (sbr. nr. 2497 og 3540).

Rennil (3566 c) flatur undir niðan, árundur omaná; tvm. 3,5 cm, h. 1,8 cm. Klíggjasteinur (3568) heilt ljósagráur á liti; l. 11,7 cm, br. 9,9 cm, t. 2,9—4 cm.

Nr. 3581. Nólsoy, St. s. — «í Kassunum», har rannsakaður er bústaður. Rennil (3581 d) sera snøggur og evnaður sum buttur toppur — toppvaxin —, flatur undir niðan; tvm. 3,9 cm, h. 2,4 cm (3. mynd, nr. 4).




3. mynd. 1, *Krintalsrennil?*; nr. 3540 b — *Soapstone drill-wheel;* 2, *Klíggjasteinur,* nr. 3588 — *Soapstone loom-weight;* 3, *Klíggjasteinur,* nr. 3568 — *Soapstone loom-weight;* 4, *Rennil* nr. 3581 — *Soapstone spindle whorl.*

Nr. 3588. Nólsoy, St. s. — undir «Niðastu Lon», har rannsakaðar eru leivdir av einum bústaði. Klíggjasteinur (3588 b) úr ljósa-gráum tilfari, ovari partur avbrotnaður, er nú: 9,6 cm l., 7,7 cm br., t. í neðra 5,2 cm, t. í erva um eygað 2,7 cm. (3. mynd nr. 2).

Nationalmuseet.

Nr. CCLXXVIII. Sumba, Su. s. Úr kirkjuni. Skírnarkar. Karið evnað sum fýrsmærublað; 34 cm høgt uttan, 22 cm djúpt innan. Tvm. uttan mátað um bløðini 64 cm, um saman-koming blaðanna 47 cm. Góðst. 5—7 cm. Ein eisini fýr-

smæruvaxin fótur, opin innan, 5 cm høgur, 43 × 46 cm hvønn vegin uttan, undir undirsíðu karsins hevur staðið niður í statt, sum ikki er til. Undir tromini uttan er hjóling allan vegin runt, niðast ein hjóling og ein rundstavur. Í botnin er høgdur ein skeivur høkjukrossur, hvørs armar møtast í einum ferhyrntum øki. Í tess miðju, sum eisini er miðja karsins, er tømingarhol út gjøgnum botnin. Eitt petti er brotnað av tromini. Komið inn 1820. Sí: Antiqvariske Annaler III. bind, II. hefti, bls. 288 og talvu II mynd VI.

Nr. CCLXXIX. Nesi, Ey. s. Úr kirkjuni. Skírnarkar. Ferhyrnt kar, við tømingarholi í botninum úti við eitt hornið. Komið inn 1820. Sí: Antiqvariske Annaler III. bind, II. hefti, bls. 288 og talvu II mynd VII.

## Kaldbak.

Kaldbak. St. s.: — «við Á»; «í Hoygarði», har búpláss hevur verið.

Nr. 6. Ílátabrot (4); eru samansett og vísa stóra grýtu, við einum næstan ferhyrntum oyra út frá tromini; útsíða og oyra eru ímut og ruflut, ruflurnar o. u. 0,4 cm breiðar og rundar í botninum, skilliga holaðar við holujarni; meitlafar innan á grýtuveggjunum. Brotini samansett: l. 14 cm, h. uttan 12,5 cm; oyrað 6,5 cm l., 6,5 cm br.; og tromin 2,5 cm t., hevur verið o. u. 50 cm vítt innan um tromina.

Nr. 7. Fýrsmærukola, funnin í gomlu garðsgrundini niðanfyri núverandi sethúsini «í Heimistovu», «við Á». Fersíðað kola við hjólaðum statti, hesin er um botnin: 6,4 × 6,4 cm; øll hæddin: 6,0 cm; kolan um tromina: 10,4 × 10,4 cm. Koluskálin evnað sum fýra smærubløð, tí nevnd fírsmærukola[7], og er 2 cm djúp. Sera vøkur og vælevnað, døkkblá á liti og allar síður slættar eins og slípaðar.

## Kirkjubø.

Kirkjubø, St. s. — í «Múrinum» nr. 1. Vígslukrossatalvur (8); nr. 2 Halgigripagoymsla. «Gullskápið». Í «Bispagarðinum.» nr. 4 Kola, ferhyrnt við hjólaðum síðum: 10 × 10 × 6 cm, ferhyrnd kulla á aðrari breiðsíðuni, eingi prýði[7]. Nr. 11. Vaðsteinur, (klíggjasteinur?), eyga nær øðrum enda og foyra frá eyganum upp um mjáendan báðumegin; l. 18,5 cm, br. 7,5–3,5 cm, t. 3,5 cm; nr. 12 Vaðsteinur? Amboð við 1 cm víðum holi boraðum 8,7 cm frá mjáendanum, frá tí gongur foyra upp um endan; minnir nógv

um blýlodd, sum tey verða nýtt nú. Núverandi longd: 13,4 cm, breidd 5,4—3,7 cm. Nr. 13. Ílát, brot, ferhyrnt uttan, holað runt innan; 8,0 × 8,0 cm uttan, 4,5 cm h.; innan 4,7 cm vítt, 2,5 cm djúpt; nr. 16 Rennil, flatur undir niðan, árundur omaná; tvm. 4,6 cm, h. 1,8 cm; nr. 17 Rennil, flatur báðumegin; tvm. 5,7 cm, h. 0,8 cm; nr. 20. Ílátabrot (2) ímut uttan, av bolla; 2,2 cm t.; nr. 21 «Inni í Toftum». Rennil flatur undir niðan, árundur omaná; tvm. 4,5 cm, h. 2 cm.

Hetta skuldi so verið tað tilfar vit hava at arbeiða við í løtuni. Til tess at fáa fundstaðir og -sløg neyvari greind í tølum er gjørd talva, ið sæst á bls. 74 og 75.

Sum talvan vísir eru fitisteinsgripir funnir í 45 støðum við meiri og minni eftirfarandi fundstaðarfrásøgnum[1]). Tilsamans eru gripirnir her 174, herafturat koma 10 uttan staðarfrásøgn.

Hesi tøl geva tó bara eina mynd av tí, sum funnið er av sovorðnum gripum í Føroyum, tí sum fyrr sagt, vita vit um fleiri enn hesar her umrøddu, og væl kann henda, at einhvør er nevndur í eldri bókmentum; men kortini man úrslitið vera álítandi og nýtandi sum aðalmynd av, hvussu víða og vanlig fitisteinsnýtslan hevur verið.

Hví tað summar staðir bara er ein, summar staðir fleiri gripir saman, er lætt at síggja. Størstu gripatølini hava vit, har fyriskipaður útgrefstur hevur verið, og næststørstu, har vaknir og hugaðir menn hava gjørt sær tann ómak at taka upp og goyma so hvørt, nakað varð funnið. Tað er tí skeivt at fáa tað úr talvuni, at ogn og nýtsla av fitisteinsamboðum og -búnýtum var størri t. d. í Kvívík ella Skálavík (Kirkjubø verður ikki tald við her, hon hevur eina serstøðu), enn t. d. í Sumba.

Hyggja vit so at fundsløgunum sæst, at til ílát, grýtur og annað sovorðið, hevur fitisteinur serliga verið nýttur.

[1]) Tessverri væntar í fleiri førum gjøllari frásøgn um fundumstøðurnar; skuldi einhvør við at lesa hetta, komist við ein og annan grip og vitað nakað meira um hann at siga, vil savnið vera sera takksamt fyri sovorðnar frásagnir.

Næst koma rennlarnir; ein orsøkin til stóra rennlatalið er merkiliga nøgdin í «Kvívíkartoftunum», onnur er tann, at funnir rennlar hava verið endurnýttir, so sum nr. 905, 1578 og fleiri.

Hetta samsvarar í øllum førum við kanningarúrslitini í Íslandi[5].

Yvirhøvur skal í hesum viðfangi verða sagt, at tað í øll= um toftum har fitisteinur er funnin, eisini eru gripir úr føroyskum tilfari, t. d.: leirílát, rennlar, kolur o. a. úr leiri og royðugróti; vaðsteinar úr malargróti o. s. fr. Oftast er eingin ella lítil munur á sniði teirra, men stundum er hann stórur. Viðhvørt eru innfluttu gripirnir í meiriluta, t. d. fitisteinsrennlar, viðhvørt teir føroysku, eitt nú vaðsteinar.

*Tíðarfesting.*

Setningur okkara var at vita, um vit kunna tíðarseta hesar gripir og hin vegin nýta teir aftur til at tíðarfesta støðini, har teir eru funnir; tað vil hjá okkum fyribils siga nakrar toftir.

Við tað at okkum væntar fitistein í gravfundum, mega vit fyribils royna eina tíðarseting fyrst eftir skapi gripanna og síðan eftir fundumstøðum teirra.

Ílátabrot. Burtur úr ílátarúgvuni ber til at skilja, *1)* rund, kúput brot og *2)* rund, flatbotnað brot við rættum og heldur reystum síðum.

1. *Kúputu brotini* eru serliga: nr. 2470, 2471, 2825, 3500 f, 4, 5, 7, 17 og 3544 f. 5; nr. 2230 og Kirkjubø nr. 20.

*Oluf Rygh*[17] hevur í Norske Oldsager (mynd 728—730) myndir av vanligastu fitisteinsílátum í víkingaøld: tey skaft= leysu, hálvkúlu= ella bollavaxnu (R 729), tey bollavaxnu við skafti (R. 728) og tey trogkendu (R. 730). Av hesum eru bollarnir (R. 729) nógv teir vanligastu.

Draga vit úr tilfari okkara tey størstu og vissastu brot= ini, fáa vit, at nr. 3500 f. 4—17 og 3544 f. 5 eru bollar

| Bygd, fundstaður | Ílátabrot | Klíggjasteinar | Hellur | Rennlar | Formar | Kolur | Grøðisteinar | Vaðsteinar | Bíleggarovnur | Alvsteinur | Skírnarkar | Vígslukrossar | Halgigripagoymsla | Rennlakendir gripir | Óvissir gripir | Ráevni | Brot | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Suðuroyar sýsla.* | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 1. Sumba, kirkjuni | | | | | | | | | | | 1 | | | | | | | 1 |
| 2. — leysfundur | | | | | | | | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| 3. Porkeri, — | | | | | 1 | | | | | | | | | | | | | 1 |
| 4. Hovi, — | | | | | 1 | | | | | | | | | | | | | 1 |
| 5. Øravík, bústaði | | | | | | | | 1 | | | | | | | | | | 1 |
| 6. Trongisvági, bústaði | | | | 4 | | | | | | | | | | | | | | 4 |
| 7. Hvalba, bústaði | | | | 1 | | | | | | | | | | | | | | 1 |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | | 10 |
| *Sandoyar sýsla.* | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 8. Skarvanesi, ? | | | | | | | 1 | | | | | | | | | | | 1 |
| 9. — leysfundur | 1 | | | | | | | | | | | | | | | | | 1 |
| 10. Sandi, bústaði | 3 | | | 2 | | | | | | | | | | | | | | 5 |
| 11. — kirkjuni | | | | | | | | | | | 1 | | | | | | | 1 |
| 12. Skálavík, bústaði | 1 | | | 1 | | | | | | | | | | | | | | 2 |
| 13. — — | 3 | | | | | | | | | | | | | | | | | 3 |
| 14. — — | 2 | 1 | 1 | 7 | | | | | | | | | | | | | | 11 |
| 15. Skopun, leysfundur | | | | 1 | | | | | | | | | | | | | | 1 |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | | 25 |
| *Vága sýsla.* | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 16. Sandavági, ? | | | | | 1 | | | | | | | | | | | | | 1 |
| 17. — bústaði | | | | | 1 | | | | | | | | | | | | | 1 |

| | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18. Miðvági, kirkjuni...... | | | | | | | | | | | 1 | | | | | | | 1 |
| 19. Mikinesi, ? | | | | 1 | | | | | | | | | | | | | | 1 |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | | 4 |
| *Streymoyar sýsla.* | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 20. Kirkjubø, «Múrinum».. | | | | | | | | | | | | 8 | 1 | | | | | 9 |
| 21. — bispagarðinum | 3 | 2 | 1 | 5 | 1 | 1 | | 2 | | 1 | | | | | 1 | 1 | nógv | 18 |
| 22. — bústaði ...... | | | | 1 | | | | | | | | | | | | | | 1 |
| 23. Tórshavn, leysfundur... | 1 | | | | | | | | | | | | | | | | | 1 |
| 24. — kirkjuni?.... | | | | | | | | | | | 1 | | | | | | | 1 |
| 25. Nólsoy, kirkjuni....... | | | | | | | | | | | 1 | | | | | | | 1 |
| 26. — bústaði ....... | 1 | 1 | 1 | | | | | | | | | | | | | | | 3 |
| 27. — — ....... | 3 | | | 1 | | | | | | | | | | | | | | 4 |
| 28. Hoyvík, bústaði?...... | 1 | | | | 1 | | | | | | | | | | | | | 2 |
| 29. Kaldbak, bústaði ...... | 1 | 1 | | 2 | | 1 | | | | | | | | 2 | | | | 7 |
| 30. Kollafirði, ? .......... | | | | | 1 | | | | | | | | | | | | | 1 |
| 31. — leysfundur.. | | | | | 1 | | | | | | | | | | | | | 1 |
| 32. Kvívík, bústaði ........ | 41 | | | 26 | | | 2 | 1 | | | | | | | 2 | | | 72 |
| 33. — leysfundur..... | | | | 1 | | | | | | | | | | | | | | 1 |
| 34. Vestmanna, bústaði.... | 1 | | | | | | | | | | | | | | | | | 1 |
| 35. Saxun, leysfundur ..... | | | | | | | | | | | | | | | 1 | | | 1 |
| 36. Hósvík, ? ............ | | | | | 2 | | | | | | | | | | | | | 2 |
| 37. Tjørnuvík, húsi........ | | | | | | | | | 1 | | | | | | | | | 1 |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | | 127 |
| *Eysturoyar sýsla.* | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 38. Nesi, kirkjuni ......... | | | | | | | | | | | 1 | | | | | | | 1 |
| 39. Strondum, leysfundur .. | | | | 1 | | | | | | | | | | | | | | 1 |
| 40. Selatrað, — .. | 1 | | | | | | | | | | | | | | | | | 1 |
| 41. Oyndarfirði, ? ........ | | | | | | | 1 | | | | | | | | | | | 1 |
| 42. Leirvík, leysfundur .... | | | | 1 | | | | | | | | | | | | | | 1 |
| 43. Søldarfirði, — .... | | | | 1 | | | | | | | | | | | | | | 1 |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | | 6 |
| *Norðuroya sýsla.* | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 44. Hvannasundi, leysfundur | 1 | | | | | | | | | | | | | | | | | 1 |
| 45. Kirkju, — | 1 | | | | | | | | | | | | | | | | | 1 |
| | | | | | | | | | | | | | | | | | | 2 |
| Tilsamans... | 65 | 5 | 3 | 56 | 10 | 2 | 4 | 5 | 1 | 1 | 6 | 8 | 1 | 2 | 4 | 1 | ? | 174 |

(4. og 5. mynd) av slagnum (R. 729) og at nr. 2230 er bollavaxið ílát við skafti, stór oysa ella heldur skaftgrýta (R. 728).

Øll hesi brot eru heldur sløtt og ímut uttan; ímskónin vísir, at tey eru kókingarílát, grýtur. Til tess hóska eisini mátini, sum samsvara mátum norsku og íslendsku grýtanna. Brot okkara hava stundum smá borað hol, annaðhvørt



4. mynd. *Grýta*, endurgjørd, nr. 3500 f. 17.
*Soapstone cooking vessel.*

tí at tey hava verið brotnað og stiftað ella hava haft metal=oyra og høddu, sum siður var í víkingaøld. (5. mynd).

Øll eru skreytleys uttan 3500 f. 17 (4. mynd), sum um tromina hevur tvær sammiðjaðar skorur eins og band. *Haakon Shetelig*[18] vísir á, at sovorðnar fitisteinsgrýtur eru evnaðar við teimum í víkingaøld rættuliga vanligu bronsu=bollunum sum fyrimynd. Men hetta slagið er sjáldsamt, flest eru funnin á Eysturlandinum, og nøkur fá, sum hava serligan áhuga fyri okkum á Suður= og Vestlandinum: 7 í Rogalandi, 1 í Hordalandi og 1 í Troms[14]. Summi av hesum havi eg sjálvur sæð í norskum søvnum; tað er eingin ivi í, at okkara er sama slagið, bæði snið og stødd vísa hetta.

*Jan Petersen*[14] er komin til tað úrslit, at tey bollavaxnu ílátini við vissu koma fyri tíðliga í 800 árunum, men at tey fyrst og fremst hoyra til í 900 árunum.

Norskir fornfrøðingar serliga *Jan Petersen*[13 14] og Sigurd Grieg[6] eru samdir um, at tey norsku fitistcinsnámini, har teir finna bolla- og skaftgrýtaevni enn standandi í berginum við bølluta botninum úteftir – men aldri kør við miðaldareyðkennum – eru úr víkingaøld.

Úr slíkum námum eru í víkingaøld grýtur fluttar út t.d. til Danmarkar[12] og til Íslands[5].

*Kr. Eldjárn*[5] hevur tíðarfest allar íslendsku bollarnar og skaftagrýturnar, summar av fundumstøðum (f. í heidnum kumlum) summar eftir skapi gripanna, til víkingaøld.

Alt samandrigið ber á tað borð, at eisini bollavaxnu ílát okkara og skaftgrýtubrot, bæði tey her umfarnu, og øll hini við sama sniði, eru úr víkingaøld, tíðarskeiðið 800–1000.

2. *Flatbotnaðu ílátini* við meira og minni reystum síðum eru serliga: nr. 373, 2467, 3544 f. 1; Kaldbak nr. 6; og Kirkjubø nr. 13, hetta seinast nevnda er harafturat ferhyrnt.

Tey flestu eru smá, so nýtsla teirra er ikki heilt viss; tó eru summi ímut uttan. Kaldbak 6, er grýta við ferhyrntum áføstum oyra út frá tromini; hetta er miðaldareyðkenni. Nr. 373 er framúr tunnveggjað ílát við fløtum botni; ikki fult so tunnveggjað, men flatbotnað er nr. 3544 f. 1: bæði hava rættar síður.

Ílát við sovorðnum sniði eru ókend í víkingaøld, men vanlig í býarfundum í miðøld[7].

Rennlar (2. mynd). Meira og minni árundir eru, sum mátini vísa, nr.: 715, 2497, 3500 d, 1, 4, 5, 7, 8, 9, 10, 12, 14, 22, 23; 3540 a og b; 3544 d, 1, 5, 7; 3566 c; Kirkjubø nr. 16, 21. Bunguvaxnir eru: 3500 d, 18: 3532 d; 3544 d, 4. Flatir báðumegin, nr. 3500 d, 2, 3, 6, 13, 16, 19; 3544 d, 8; Kirkjubø 17. Toppvaxin nr. 3581 d. Bara teir sum hava óivasamt snið eru tiknir við her.

Vit síggja, at teir árundu rennlarnir eru flestir, næst teimum komu teir fløtu báðumegin.

Í Noregi[14] eru teir nógv flestu fitisteinsrennlar í víkingaøld flatir undir niðan, meira og minni árundir omaná, við

størsta tvørmáti um fótin. Onnur snið, sum eisini kend eru í øldum frammanundan, koma fyri, serliga nakrir sum eyðkendir eru við at vera breiðastir eitt sindur omanfyri fótin, sbr. okkara nr. 3500 d 18 og 3544 d 4 (2. mynd). Norskir rennlar í eldri jarnøld eru vanliga prýddir; í víkingaøld sjáldan uttan sum okkara við klingrum um eygað og smáskorum út frá tí og á rondini.



5. mynd. *Grýta* nr. 3544 f 5. — *Soapstone cooking vessel.*

Høvuðsmátini á norsku, íslendsku og føroysku eru tey somu.

Einstakir okkara hava eins og íslendsku[5] hak í rondini: 3500 d. 4 og 18, ella hol í breiðsíðuni tætt við rondina, 2469, (til tógvið?).

Lætt er ikki við so vanligum amboðum sum rennlum at seta tíðarmark upp í tíðina, sniðini kunna hava hildið sær leingi; men samanborið við tað sum sagt er um norskar rennlar, so vísa óivað eisini hesir hjá okkum, fram um alt teir bunguvaxnu og fyri ein part teir árundu, til víkingaøld.

Teir fløtu kunna vera frá øllum tíðarskeiðum; í hesum viðfangi skal verða bent á, at í toftini í Kaldbak, sum av øðrum grundum má vera úr miðøld, eru allir rennlarnir flatir.

Kolur. (7. mynd). Her eru bara tvey dømi: Kirkjubø 4 og Kaldbak 7.

Báðar hesar eru ferhyrntar við hjólaðum statti, og eru úr miðøld[7].

Eingin fitisteinshalakola er funnin enn, tað vit vita; hetta er løgið, tá vit hava í huga, hvussu vanligar kolurnar úr royðugróti eru, og hvussu stór fitisteinsnýtslan annars tykist hava verið.

Vaðsteinar. (6. mynd). Kirkjubø 11 og 12 hava eitt hol við foyru í øðrum enda, allir hinir: nr. 2103, 2137, 3500s, hava hol í báðum endum eftir miðlinjuni á breiðsíðuni, men ongar umgangandi longdar- ella tvørfoyrur, eins og allir teir úr malargróti, eisini í hesum fundum, hava. Nr. 2103 og 2137 hava tó haft foyru frá eygunum upp um endan.

Í Noreg koma fyri í víkingaøld vaðsteinar við einum holi í øðrum enda og sniði nakað sum okkara, Kirkjubø nr. 11 og 12, og nr. 2103, men vit vilja serliga hyggja at hinum við holi í báðum endum. Av hesum slagi eru 7 norskir. Teirra nr. C 17495 frá Vestfold og okkara 2137 minna um bátar við rundsneiddum stevnum, flatir øðrumegin, høgt árundir hinumegin, so tvørskurðurin verður sum hálvkúla. Tann norski er tíðarfestur til seinast í 800 árunum[14].

B 2929 frá Vestlandinum og okkara 3500 s, eru eggklingrutir við ávalum tvørskurði, og sum á hinum frammanundan nevndu eru endarnir avkubbaðir. Norski vaðsteinurin er við rúnarinnriti tíðarfestur til seinra helming av 600 árunum[14].

Tann yngsti av hesum 7 norsku, St. 4750 úr Rogalandi, er eftir rúnainnriti settur til o. u. 1050[14]; men hesin er tó bøllutari enn allir hinir.

Her kann eingin ivi vera, eisini okkara fitisteinsvaðsteinar eru úr víkingaøld.

Skírnarkør (1. mynd). Flest øll eru funnin í kirkjugørðum elle eru komin úr kirkjum.

Í Stavanger Museum (nr. 3116) stendur eitt ferhyrnt, einfalt, fitisteinsskírnarkar á lágari, ferhyrntari fitisteinshellu. Karstøddin er 43 × 48,5 cm, tromin 4 cm tjúkk; strútvaxið, síðurnar sviknar.



6. mynd. *Vaðsteinar* nr. 2137 og 3500 s. — *Soápstone fish-weights.*

Øll okkara nr. 245, 1153, 1796, 2817, CCLXXIX hava nakað somu stødd og snið; tó hava 2 súluvaxin horn. Á øllum okkara er eins og á hesum norska hol út gjøgnum botnin. Gjøgnum hetta rann skírnarvatnið beint út í vígda jørð. Hesi tømingarhol í botninum eru felagseyðkenni fyri allar norskar skírnarfontar eldri enn byrjanina av 1200 árunum [11].

Stavanger Museum hevur eisini ein (nr. 3114) nakað sum okkara nr. CCLXXVIII. Norsku skírnarkørini við hesum sniði metir *Kjellberg* [11] ikki at vera eldri enn o. u. 1250 og ikki yngri enn o. u. 1280.

Okkara kør munnu ivaleyst vera innflutt úr Noregi, har teir eitt mundið beinleiðis høvdu skírnarkar-smiðjur[9]. Okkara mega tí vera frá somu tíðarskeiðum sum tey norsku: 1100 og 1200 árunum.

— — —

Spyrja vit so hvørjar gripir í hesum tilfari, vit kunna nýta til tíðarfestingar, verður svarið:

*Fyri víkingaøld,*

tala við vissu: 1) tey rundu, bollavaxnu ílátini: skaftleysu grýturnar og skaftgrýturnar, 2) teir bunguvaxnu og yvirhøvur teir árundu rennlarnir, 3) fitisteinsvaðsteinarnir.

*Fyri miðøld,*

tala við vissu: 1) tey rundu, flatbotnaðu, rættsíðaðu ílátini, 2) grýtur við oyra áføstum tromini, 3) ferhyrnt ílát; 4) kolur við statti, 5) skírnarkørini, 6) og sjálvsagt allir aðrir fastir og leysir kirkjugripir, serliga í Kirkjubø.

Tey fyrivarni, ið eiga at vera tikin eru: 1) Ráevni kann vera innflutt, og úr tí her á landi evnað ílát o. a. við fornum gripum sum fyrimynd; men við tað at einki ráevni er funnið uttan í Kirkjubø, er eingin grund at rokna við hesum.

2) Gripir við gomlum sniði kunna vera innfluttir seinri í tíðini, aftaná at hesi snið vóru farin úr brúki í framleiðslulondunum. Hetta kann hugsast, men ger lítlan mun, tí neyvan hava slíkir gripir verið at fáa til keyps leingi aftaná, teir ikki vóru «mótavara» longur.

3) Fitisteinsgripir, hava óivað hóast alt, verið hátt mettir, og eingin kann taka fyri, at teir hava ikki verið arvaðir, nýttir ella goymdir gjøgnum fleiri ættarlið, áðrenn teir eru komnir í jørðina. Hetta kann eina avgerast eftir fundumstøðunum, t. d. um sovorðnir gripir eru funnir saman við øðrum frá somu tíð.

*Eftirroynd.*

Eftir tí, omanfyri er sagt, skuldi tað verið gjørligt at tíðarfesta eftir sniði gripanna; men vissu fyri hesum fáa vit bert, um vit einhvørjar staðir finna hesar nevndu gripir undir umstøðum, sum á annan hátt miða móti somu tíðarskeiðum, sum ásett eru fyri gripirnar.



7. mynd. *Fýrsmærukola*, Kaldbak nr. 7. — *Sopstone lamp.*

Í Kvívík[4] hava vit t.d. tvær toftir omaná hvørji aðrari. Tann ovara er avlangt, ferhyrnt hús við tvílaðaðum veggjum og langeldi nær suðurskjøldurinum. Henda toft er sermerkt við miðaldarskóm, sum mega vera frá miðøld, ella 11–1200 árunum. Í hesi toft hava vit annars ílátið 3544 f 1, sum eftir útsjónd er tíðarsett til miðøld. Viðmerkt skal vera, at her eisini finnst ymist, serliga rennlar, sum fyri alt tað kunna vera eldri, sniðini minna um samsvarandi í teirri niðaru toftini.

Men rennlar eru, sum sagt, hálir um at halda sum tíðarfestingarhjálp. Høvuðsúrslitið verður tó ikki broytt av hesum. Fundir og toft her eru úr miðøld.

Millum toftirnar er umleið 50 cm tjúkk flógv, sum ruddiliga skilir millum toftirnar, og ein skillig lyng- og

mosalind gjøgnum hesa vísir, at lendið má hava ligið opið og vallað í einum nakað longum millumtíðarbili.

Niðara toftin er eggklingrut høll, við ífyllingarveggjum, langeldi og kullu í miðjuni; ein byggiháttur sum í Norðurlondum, kanska serliga Noregi, er vælkendur í víkingaøld. Her eru funnin tey flestu av ílátunum nr. 3500f og 3544f, sum eftir skapi teirra eru tíðarsett til víkingaøld, fyrst og fremst nr. 3500f 17; nakrir bunguvaxnir og fleiri árundir rennlar og vaðsteinurin nr. 3500s. Saman við hesum hava vit ein blýrennil, ið væl kann vera úr víkingaøld, eina klingruta ravperlu, og serliga tvær silvurlagdar glasperlur, sum vísa til víkingaøld, 900 árini; men eingin gripur sum gevur illtanka um miðøld.

Fundsamansetingin krevur tí, at allir gripir í høllini mega vera úr víkingaøld, ella nærri 900 árunum.

Alt samanlagt fáa vit burtur úr hesum, at fitisteinsgripir okkara yvirhøvur — við einstakum undantakum t.d. fitisteinsbileggarovnum — vísa á víkingaøld ella miðøld, og at um fitisteinsgripir eru funnir undir toluliga tryggum umstøðum, kunna vit hava mikið gagn av teimum til tíðarfestingar av fornum bústøðum og av øðrum forngripum.

## SUMMARY

Soapstone does not occur naturally in the Faroes. The above article contains: 1. a general description of soapstone objects in the Faroes and a discussion of their distribution, and 2. an attempt to date with the aid of these according to type and the general circumstance of the finds.

The Table on p. 74—75 shows where the finds were made 45 in all; with the number of specimens of each type. The objects found total 174 plus 10 others where there is no information as to provenance. None were found in graves, a few were random finds, while the great majority were unearthed in human habitations particularly in excavated house ruins. Soapstone was chiefly used for pots, cooking vessels, and as weigths on hand spindles.

The following fiinds indicate the viking age: 1. cups whithout

stems (Rygh[17] 729, Shetelig[18] 23); 2. pots with stems (Rygh[17] 728); 3. sinkers for fishing lines (Jan Petersen[14], fig. 144; 4. weigths (for spindles) more or less arched on the upper surface (Jan Petersen[14—16]).

And following finds indicate the middle age: 1. round, flat-bottomed vessels with perpendicular sides both with and without attached handles (Grieg[7], fig. 170); 2. lamps (Grieg[7], fig. 41); 3. square vessels with thin sides. 4. baptismal fonts (Kjellberg[11], fig. 1 and 4); 5. various objects from the bishop's residence and the cathedral at Kirkjubøur.

## BÓKMENTIR

1. *Bárðarson, Ivar*: Det gamle Grønlands Beskrivelse. København 1930, bls. 54.
2. *Brøgger, A. W.*: Løgtingssøga Føroya I. Tórshavn 1937, bls. 196.
3. *Brøgger, A. W.*: Den norske bosetningen på Shetland-Orknøerne. Oslo 1930, bls. 162, mynd 75.
4. *Dahl, Sverri*: Fornar toftir í Kvívík. Heiðursrit til R. Rasmussen á 80 ára føðingardegnum 13. august 1951. Varðin bd. XXIX. Tórshavn 1951.
5. *Eldjárn, Kristján*: Klèberg á Íslandi: Árbók hins íslenzka fornleifafélags. Reykjavík 1951, bls. 41 f.
6. *Grieg, Sigurd:* Norske kleberstensbrudd fra vikingetiden. Universitetets Oldsakssamlings Årbok 1930, bls. 88 f.
7. *Grieg, Sigurd*: Middelalderske byfund. Oslo 1933.
8. *Grieg, Sigurd*: Det norske håndværks historie I. Oslo 1936, bls. 77.
9. *Jakobsen, Jakob*: Etymologisk ordbog over det norrøne Sprog på Shetland. København 1908.
10. *Jacobsen, M. A.*: Føroyskir fornlutir. Jól í Føroyum 1932.
11. *Kjellberg, Reidar*: Døpefonter fra middelalderen i Rogaland. Stavanger Museums Årbok, 1953, bls. 77 f.
12. *Nørlund, Poul*: Trelleborg, København 1948.
13. *Petersen, Jan*: Vikingetidsstudier, Bergens Museums Årbok 1919–20.
14. *Petersen, Jan*: Vikingetidens redskaber, Oslo 1951.
15. *Petersen, Jan*: Gamle gårdsanlæg i Rogaland I. Oslo 1933.
16. *Petersen, Jan*: Gamle gårdsanlæg i Rogaland II. Oslo 1936.
17. *Rygh, Oluf*: Norske Oldsaker. Cristiania, 1885.
18. *Shetelig, Haakon*: Kar af klebersten fra jernalderen. Oldtiden. II, bls. 49 f.